


# Sølufólk til
## Ergo & Hjálpartól

Til at ferðast kring landið verður søkt eftir royndum sølufólki at byrja skjótast gjørligt.

Starvið fevnir um:
- At røkja verandi viðskiftafólk
- Uppsøkjandi søluarbeiði
- Sølufremjandi tiltøk
- Rokna út tilboð
- Upplæring/skeið fyri viðskiftafólkið.

Vit bjóða eitt sera áhugavert og fjølbroytt starv, við nógvum avbjóðingum. Skrivstovan er í Havn, men arbeiði er um alt landið. Tú mást kunna arbeiða sjálvstøðugt, og verða kreativur.

Umsøkjari við royndum innan hjálpartólaøkið hevur fyrimun, hetta er tó eingin treyt, neyðugt upplæring fer fram í Føroyum og uttanlands.

Góður málkunnleiki í skrift og talu er ein fyritreyt, eins og koyrikort er neyðugt.

Skrivlig umsókn við viðmælum og CV verður at senda til

Ergo & Hjálpartól

Íslandsvegur 39 · FO-100 Tórshavn · Tlf. 315777

**Umsóknarfreist:** Mánadagin 31. mars.

Ergo & Hjálpartól er ein fyritøka, ið umframt at selja hjálpartól og ergonomiska útgerð til stovnar, sjúkrahús og privat um alt landið, eisini bjóðar ergoterapeutiska ráðgeving og viðgerð. Fyritøkan er stovnað í 2001 og er í støðugari menning. Ergo & Hjálpartól flytir í størri hølir, miðskeiðis í Havn um stutta tíð.

# Tilmelding til Útibarnagarðin á Svangaskarði

Tey, ið ætla at søkja um upptøku í Útibarnagarðin eftir summarfrítíðina mugu lata umsóknir inn áðrenn 1. apríl.

Børn, sum eru fødd í 1997, fáa fyrst pláss og er upptøkan eftir aldri. Rúmast fleiri, fáa tey elstu í árgangi 1998 møguleika at verða tikin inn.

Børn, sum eru í dagrøktini, fáa umsóknarblað frá dagrøktarleiðaranum, onnur kunnu ringja ella koma inn á gólvið eftir umsóknarblaði.

Útistovan leggur áherðslu á at verða úti og brúka ymisku árstíðirnar við tí, tær hava at bjóða. Vit hava kortini góðar møguleikar at vera inni, tá veðrið ikki er til vildar.

Arbeiðið okkar er eisini, at fyrireika børnini til, at tey skulu í skúla, við at menna tey til sjálvbjargni og at menna tey kensluliga og sosialt.

**Útibarnagarðurin Útistovan**
Á Svangaskarði · FO-650 Toftir
Tlf. 448760 – 228460

## Málningaframsýning á páskum

1. og 2. páskadag (20. og 21. apríl) hevur Lions Club Eysturoy sína árligu málningaframsýning í Runavík

Tey ið hava hug at luttaka biðjast siga frá í góðari tíð á tlf. 449801 Jákup, 441666 Eyðbjørg ella 443003 Jógvan.

Tey ið luttóku seinasta ár, verða uppringd av einum av limum okkara

**Lions Club Eysturoy**

## Telduskeið í hardware

**AKA TRADE** heldur 32 tíma skeið fyri teimum, ið sjálvi vilja seta teldur saman.

Skeiðið verður í Felagsskúlanum á Oyrarbakka.

Byrjar 15. mars frá kl. 8.00 til 16.00 og heldur fram 3. fylgjandi leygardagar.

**Prísur kr. 3.000,-**

Fleiri upplýsingar frá skeiðleiðaranum Anna Armannsdóttir tlf. 260226

<ph_1>

Sosialurin -tað loysir seg



**Heimarøktin og Serforsorgin**
*Meginskrivstovan*

# Uppslag
## Stjóri fyri Serforsorgina og Heimarøktina

**Starvið sum stjóri fyri Serforsorgina og Heimarøktina verður hervið lýst leyst til setan sum skjótast.**

**Starvið er skipað undir Almannamálaráðnum, við tilvísing til aðalstjóran. Í løtuni verður arbeitt við at leggja eldraøkið út til kommunurnar, so tann, sum settur verður, má tola broytingar í sínum starvi.**

**Um starvið:**
- Stjórin fyri Serforsorgina og Heimarøktina hevur fyrisitingarliga og fíggjarliga ábyrgd av Serforsorgini og Heimarøktini innan teir fíggjarkarmar, sum hvørt ár verða samtyktir í løgtingsins fíggjarlóg.
- Stjórin skal saman við fakligu leiðarunum innan økini virka fyri støðugt at menna Serforsorgina og Heimarøktina. Stjórin skal arbeiða fyri at skipa økini soleiðis, at tey í størst møguligan mun samsvara við tørvin hjá brúkarunum við galdandi treytir.
- Stjórin skal arbeiða fyri at menna samskiftið við allar stovnar innan almannaverkið og soleiðis menna eitt tvørfakligt samstarv.

**Førleikakrøv:**
- Viðkomandi útbúgving
- Leiðsluevni og royndir
- Vitan um almannaverkið
- Evni at seta í verk fyriskipanir
- Evni til at menna leiðarar og starvsfólk
- Góð samstarvsevni

**Setanartreytir:**
Starvið er tænastumannastarv, við setanartreytum sambært løgtingslóg um tænastumenn landsins. Starvið er flokkað í 37. lønarflokki.

Setanin fevnir um alt Almannamálaráðið og stovnar undir tí.

**Umsókn:**
Umsókn við avriti av prógvum o.ø. skal sendast til:

**Almannaráðið**
Att.: Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
100 Tórshavn

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Sólju í Ólavstovu, aðalstjóra, ella Eyðun Mohr Hansen, deildarstjóra tlf. 30 40 50.

**Umsóknarfreist:**
Umsóknin skal vera Almannaráðnum í hendi í seinasta lagi

**Mánadagin 24. mars 2003 kl. 12**

## Búmerkjakapping

Tofta Arbeiðarafelag skipar fyri búmerkjakapping.

Búmerkið skal ímynda virksemi felagsins, men nevndin setir annars ikki krøv til skap ella litir á búmerkinum.

**Virðislønir verða latnar fyri 3 tey bestu uppskotini:**

1. virðisløn kr. 5.000,-
2. virðisløn kr. 3.000,-
3. virðisløn kr. 2.000,-

Uppskotini skulu sendast inn í afturlatnum brævbjálva við frámerki, saman við brævbjálva við sama frámerki við navninum á innsendaranum.

Nevndin í Tofta Arbeiðarafelag velir tað besta uppskotið, men skilar sær eisini rætt til ikki at velja nakað uppskot.

Uppskotini skulu sendast til:
**Tofta Arbeiðarafelag**
**650 Toftir**

Freistin at lata uppskot til búmerki inn er 26. mars 2003

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 2875, P/F Søkin, 100 Tórshavn.

**Viðtøkur broyttar:** 06.01.2003.
**Nevnd:**
**Innkomin í nevndina:** Magni Skaale, Slættalíð 2, 100 Tórshavn og Óluva Skaale, Grønalíð 10, 100 Tórshavn.

*Skráseting Føroya tann 6. mars 2003*
*Kristin Balle*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 3144, P/F Yngul, 780 Kunoy.

**Viðtøkur broyttar:** 03.03.2003
**Nýtt navn:** Sp/f Yngul
Lækkan av P/F-peningi við kr. 102.044,00 til rindan av halli og kr. 315.000,00 til útgjalding til partaeigarar, viðtikið 08.10.2002 er nú gjøgnumførd.
**Kapitalur:** Kr. 82.956,00.
**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Sjúrður Jacobsen, 765 Svínoy (formaður), Alfred Petersen, Suðuroyarvegur 8, 100 Tórshavn og Jógvan Sakaris Eliasen, Garðsendi 2, 700 Klaksvík.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av stjóranum.

*Skráseting Føroya tann 6. mars 2003*
*Kristin Balle*

Lesið Sosialin

www.sosialurin.fo

# Skrivstovufólk søkjast til SEV

Eitt fulltíðarsstarv og eitt hálvdagsstarv sum skrivstovufólk hjá SEV í Havn er leyst at søkja.

**Starvið:**
Størvini eru á skrivstovuni hjá SEV í Havn. Fulltíðarstarvið umfatar í samstarvi við onnur skrivstovufólk at røkja ymiskar skrivstovuuppgávur, herundir at passa telefonvekslara og veita kundatænastu.

Hálvtíðarstarvið umfatar at passa telefonvekslaraskipanina hvønn dag frá kl. 9.00 til kl. 13.00. (20/37 av fulltíðarstarvi).

**Útbúgving:**
Ynskiligt er, at umsøkjararnir til fulltíðarstarvið hava skrivstovuútbúgving ella aðra viðkomandi útbúgving/ arbeiðsroyndir.

**Førleikakrøv:**
Umsøkjararnir skulu hava góðar førleikar, bæði í skrift og talu, í føroyskum og donskum. Harafturat skal viðkomandi kunna føra samtalur á enskum, við tað, at ofta hevur SEV samskifti við fólk, ið ikki duga føroyskt og danskt.

Ein partur av kundatænastu og kundaviðgerð hongur neyvt saman við debitorbókhaldinum. Tí er tað ein fyrimunur, at umsøkjararnir til fulltíðarstarvið hava kunnleika til bókhald og teldubókhaldsskipanir.

Góð samstarvsevni krevjast við tað, at flestu arbeiðsuppgávurnar verða loystar í samstarvi við onnur, og skal viðkomandi vera til reiðar at átaka sær fyrifallandi smærri praktiskar uppgávur, sum hoyra skrivstovuni til, men sum kanska ikki í øllum førum kann bólkast beinleiðis sum skrivstovuarbeiði.

**Lønin:**
Fulltíðarstarvið er lønt sambært sáttmála millum SEV og Starvsmannafelagið. Lønin verður ásett eftir útbúgving og starvsroyndum og verður flokkað í II. ella III. lønarflokki.

Hálvdagsstarvið verður lønt eftir útbúgving og roynd í I. ella II. lønarflokki.

**Umsóknir:**
Umsóknir skulu saman við prógvum og møguligum ummælum sendast til Elfelagið SEV, Postrúm 319, 110 Tórshavn, og skulu tær vera SEV í hendi í seinasta lagi tann 24. mars 2003.

Í umsóknini skal tilskilast, um viðkomandi søkir fulltíðarstarv ella hálvdagsstarv ella bæði. Um bæði verða søkt, skal tilskilast, hvat umsøkjarin leggur størri dent á.

Teir umsøkjarar, sum eisini søktu skrivstovustarv hjá SEV í Havn seinasta heyst, nýtast ikki at senda prógv, ummæli v.m. inn í nýggjum, men kunna bert siga frá, hvat starv verður søkt og annars vísa til áður innsendu umsókn.

**Nærri upplýsingar:**
Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til John P. Danielsen á tlf. 346800.

Tórshavn, tann 6. mars 2003

**Elfelagið SEV**